# Eysturlendsk heystarskrá

**Brellbitin er helst heimadysturin móti Eysturríki, men í aðrar mátar tykist skráin hjá føroyska landsliðnum í heyst ikki vera tann mest áhugaverda**




*Soleiðis ímyndaði danski fótbóltsvenjarin og -teknarin, Ole Andersen, sær reaktiónirnar í Eysturríki, tá lutakastið til komandi HM-undankappingina fór fram í november mánaði í fjør*

Við trimum eystureuropiskum mótstøðuliðum í heyst verður talan neyvan um tað heilt stóru áskoðarafjøldina, sum føroyska landsliðið fer at draga at sær komandi landsliðsárið.

Skal nakar dystur takast framum, so er einki at ivast í, at føroyski áskoðarin gleðir seg til oktober mánað, tá Eysturríki kemur á vitjan. Og ongan tíð betri, enn um maðurin við stýrisvølin tá framvegis eitur Josef Hickersberger. Sami Hickersberger, sum náttina til 13. september fyri 18 árum síðani fekk sekkin, eftir at Eysturríki hevði verið fyri størstu fótbóltseyðmýkingini í annars so stoltu fótóltssøguni hjá landinum.

Eins væl og dysturin ta ferðina markeraði ein niðurtúr av teimum heilt stóru fyri eysturríkskan fótbólt, so var hetta eisini okkara stóra fótatraðk inn á altjóða pallin. Og hóast úrslitini fyri tað nógva vóru greið tap, so tænti dysturin sum støðu áminning til mótstøðuliðini um, at Føroyar ikki skuldu undirmetast alt ov nógv.

Kring túsundáraskiftið gav føroyska fótbóltslandsliðið eisini fleiri slíkar áminningar. Hóast talan sjáldan gjørdist um sigrar, so fingu fleiri av mótstøðuliðum okkara at vita, at tey ikki skuldu taka nakað sum helst fyri givið móti okkara ellivu. Ein veruleiki, sum tó ikki hevur verið heilt so lættur at staðfesta seinastu tvey árini.

**Flogræðsla í Fraklandi**

Orsøkirnar til lakaru úrslitini eru fleiri. Men eitt ættarliðsskifti blandað við svartasta óhepni við skaðum eru helst týdningarmestu orsøkirnar í so máta.

Nýggja landsliðsættarliðið er nú av álvara við at taka skap, men tað verður helst ikki her og nú, at føroyski áskoðarin sær úrslitið av arbeiðnum, sum er gjørt í so máta.

Hinvegin eru ungu menninir nú tvey ár eldri, og statistiskt ber næstan til at siga við vissu, at skaðaóeydnan ikki verður tann sama komandi tvey árini, sum hon hevur verið.

Tí var tað við ávísum spenningi, at sæð varð fram til lutakastið í fjør, men verður sæð burtur frá Eysturríki, so var talan um eitt hampuliga lítið áhugavert lutakast.

Serbia, Rumenia og Litava eru veldugar avbjóðingar ítróttarliga. Og kanska eru útlitini fyri onkrum stigi móti Litava ikki heilt eingi. Men eystureuropiskur fótbóltur er ikki tað, sum føroyskir fótbóltsfjepparar geva størstan ans.

Og hóast Frakland telur fleiri av fremstu spælarunum í heiminum, so man tað kennast hálvgum trivielt, tá talan er um triðju undankappingina á rað, at Frakland er millum mótstøðulið okkara. Í so máta man størsti dramatikkurin helst snúgva seg um, hvørt Henry og hinar stjørnurnar yvir høvur hava hug at seta seg í eitt flogfar við kós móti lítla vøllinum í Vágum.

Men tann 11. oktober verða eyguni vend móti oyggjum okkara. Tað kann væl verða, at Eysturríki ikki longur er tað, sum landið eina ferð var í altjóða fótbóltshøpi. Og hvørki Hans Krankl ella Tony Polster gera longur um seg á europisku fótóltsvøllunum.

Men minniligi dagurin fyri 18 árum síðani er framvegis eitt stórt kapittul í altjóða fótbóltssøguni. Ikki bara hjá okkum sjálvum og eysturríkarum. Søguskrivingin ta ferðina er javnt stór við amerikanska sigurin á Onglandi í 1950. Og spurningurin hesa ferð er tí, um lítlu Føroyar megna at skriva enn ein part av altjóða fótbóltssøguni, tá Hickersberger og hansara menn aftur koma á vitjan.

**FAKTA**

**Dystarskráin hjá føroyska liðnum sær soleiðis út:**

| | |
|---|---|
| 6. september 2008 | Serbia – Føroyar |
| 10. september 2008 | Føroyar – Rumenia |
| 11. oktober 2008 | Føroyar – Eysturríki |
| 15. oktober 2008 | Litava – Føroyar |
| 10. juni 2009 | Føroyar – Serbia |
| 19. august 2009 | Føroyar – Frakland |
| 5. september 2009 | Eysturríki – Føroyar |
| 9. september 2009 | Føroyar – Litava |
| 10. oktober 2009 | Frakland – Føroyar |
| 14. oktober 2009 | Rumenia – Føroyar |

---

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*